Jakob Haugaard bjóðaði sínum veljarum pylsur einaferð um árið, so hvør veit?

**Maður, 43 ár**

# Miðlamjarr

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein



„Eg skilji ikki, at eitt land sum okkara ikki fær meira burtur úr akademikarunum. Tað virkar, sum at teir bíða eftir, at onkur annar skal gera tað fyri teir. Tað virkar, sum teir ganga og bíða eftir Godot, ella hvørjum tað er.

Jonhard Mikkelsen, høvuðsmaðurin í Sprotanum, heldur, akademikarar kunu gjørt meira fyri móðurmálið (Refleksjón)



„Tilsamans hava 130 fólk sitið í býráðnum í Havn, av hesum teljast 14 kvinnur

Býráðspolitikarin Elin Lindenskov ger støðuna upp



Danskarar snakka eina fanans rúgvu – einki annað. Bara snakka!

Sonhard Johannesen sigur tað, sum tað er (Fólksins Rødd)

Eg haldi meg vera rættiliga dovna. Tann ideelli dagurin hjá mær hevði verið, um eg slapp frá at fara upp úr songini.

Songkvinnan Gwen Stefani (Elle)



Var um at gerast bangin, nú tíðindasendingin hjá KVF var um at vera liðug og ongin makrelur var umrøddur. Men so kom innslagið loksins. Uha, ongin dagur uttan makrel í tíðindunum.

**Maður, 45 ár**



„Eg eri ikki komin her at berjast við tykkum

Umhvørvismaðurin Pete Bethune tosar diplomatiskt á Føroyavitjan (Rás2)




Tú kanst ikki sita og bíða eftir, at lagnan fer at geva tær tað, sum tú heldur teg hava uppiborið. Tú mást stríðast fyri tí.

Gittarspælarin Slash

Friður á borgini. Maðurin til arbeiðis, gellan í vøggustovu og frúan við kaffikoppinum og ongum planum fyri dagin. Love it:)

**Kvinna, 30 ár**

Ídag er 14. Mars, eg haldi at vit, ið mintust kvinnurnar 14. feb., kunnu gleða okkum :)

**Maður, 35 ár**